# Nýggi Smyril: Ringt at fáa pusslispælið at ganga upp

**– Eg havi fingið til uppgávu at byggja nýtt suðuroyarskip og tí má eg eisini fáa pening at gjalda tað fyri, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður. Hann heldur, at serligir útvegir mugu finnast fyri at finna fígging til skipið**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



Tað verður eitt tungt hoyggj at draga at fáa hetta roknistykki at ganga upp.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum hevur fingið eitt ringt pusslispæl at leggja.

Hann hevur fingið ábyrgdina av at byggja eitt nýtt Suðuroyarskip, sum er mett at kosta 305 milliónir krónur.

Men harumframt krevur hetta skipið, at nýggj havn verður bygt í Suðuroy fyri 50-75 milliónir. Oman á alt, hevur Løgtingið eisini samtykt, at Smyril skal sigla á Vág og har er eisini neyðugt at byggja havnina út, men tað skal gerast sum ein partur av aðrari havnaútbygging, alt tað arbeiðið kostar góðar 20 milliónir.

Suðuroyarferjan verður liðug í 2004 og tá skulu havnaviðurskiftini eisini verða komin í rættlag fyri at skipið skal kunna leggja at – og liggja trygt.

Bæði Strandferðslan, Landsverkfrøðingurin og umsitingin í Vinnumálastýrinum hava mælt til, at havnirnar verða bygdar út, so at tær eru lidnar, samstundis sum skipið er liðugt.

– Tilsamans kostar nýggja suðuroyarskipið og havnaútbyggingarnar einar 360- 380 milliónir, sum allar skulu betalast tey næstu trý, fýra árini, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at í ár hevur Vinnumálastýrið 130 milliónir til taks til útbyggingar og tað verður neyvan meiri tey komandu árini.

– Tískil er greitt, at suðuroyarskipið og havnirnar fara avstað við tí allarmesta av tí, sum vit hava til taks yvirhøvur.

Hann vísir á, at samstundis eru onnur arbeiðið í gerð, sum tað ber illa til at steðga.

Hann heldur tí, at tað er ómøguligt at byggja skipið innanfyri teir íløgukarmar, sum eru lagdir.

Men hann leggur afturat, at fyri honum er ongin ivi um, at nýtt skip skal byggjast.

– Og politisk viljin er at byggja hetta ávísa skipið – og tað verður bygt.

*Tað verður eitt ringt pusslispæl at fáa at ganga upp at finna fígging til nýggju suðuroyarferjuna. Men politiski viljin er til at byggja hetta skipið, og tað verður bygt, so fíggingina finna vit eisini, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum*

### Finna eina loysn

Landsstýrismaðurin sigur, at hann tí hevur skotið upp at gera suðuroyarskipið til eina serliga íløgu og at leggja hana uttanfyri vanliga íløgukarmin.

Hann sigur, at hetta letur seg gera, uttan at tað fær búskaparligar avleiðingar fyri samfelagið.

– Hetta er eitt skip, sum verður bygt uttanlands og tað fer hvør króna uttanlands. Hetta er tí ikki ein íløga, sum fer at hita búskapin, ella at hava nakra sum helst ávirkan á annan hátt.

– Skal hetta skipið takast við íløgukarmin, merkir tað, at alt annað má leggjast stilt í trý, fýra ár og tað ber ikki til, tí tær íløgurnar, vit gera, eru ógvuliga avmarkaðar frammanundan. Skulu vit stara okkum blind upp á íløgukarmin, mugu vit velja antin suðuroyarskipið, ella aðrar útbyggingar, tí bæði fáa vit ikki.

Ein vissur orðadráttur hevur verið í samgonguni um um, hvussu skipið skal fíggjast, men landsstýrismaðurin heldur, at partarnir eru farnir at nærkast hvørjum øðrum.

Enn veit hann ikki, hvør loysnin verður. Men hann sigur, at hann góðtekur ikki, at hann fær eina uppgávu at loysa, uttan at fáa pening at loysa hana fyri. Og hann ivast heldur ikki í, at ein loysn verður funnin.

# Onki problem at fíggja nýggja suðuroyarskipið

**– Tess meiri eg hugsi um tað, tess minni fortreð havi eg av, at tað kostar so nógv, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*– Hjá mær er nýggja suðuroyarskipið ráðfest allar ovast tey næstu árini og tað verður onki problem at finna fígging til skipið, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum*

– Tað verður onki problem at finna fígging til tað nýggja suðuroyarskipið.

Tað er Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, púra sannførdur um.

Hann sigur, at tað er ongin ivi um, at skipið skal byggjast og at tað verður heldur ongin ivi um, at fígging verður funnin til tað.

– Nú er tað óvist, hvussu nógv, skipið fer at kosta, tað kann einsvæl kosta 250 milliónir, sum tað kostar omanfyri 300 milliónir.

Men Karsten Hansen heldur framvegis ikki, at nýggi Smyril skal gerast til eina serliga íløgu, sum skal leggjast uttanfyri vanliga íløgukarmin hjá landinum upp á slakar 200 milliónmir um árið, hóast nýggja Suðuroyarskipið fer avstað við meiri enn helvtini av øllum íløgunum tey næstu trý árini.

– Tað ber væl til at fíggja skipið innanfyri íløgukarmin, sigur hann.

Hann vísur á, at ein langtíðar íløguætlan er gjørd og á henni eru tilsamans 240 milliónir settar av til nýtt suðuroyarskip í árunum frá 2000 til 2004.

Í ár eru 30 milliónir settar av. Minnist meg rætt, eru 85 milliónir settar av til endamálið í 2002 og aftur 85 milliónir í 2003 og restin er sett av í 2004.

– Kostar skipið 300 milliónir, skulu sostatt 60 milliónir finnast afturat tey næstu trý árini, ella 20 milliónir um árið.

Hann sigur, at tær 30 milliónirnar, sum eru settar av til skipið í ár í ár, verða ikki brúktar.

– Og eg dugi ikki at síggja nakran sum helst forðing í at fáa tær fluttar til tey bæði komandu árini, so at vit hava 100 milliónir til skipið í 2002 og 2003.

– Hann sigur eisini, at longu nú er tað greitt, at allar útbyggingar, sum ætlanin var at gera í ár á ymsum økjum, verða ikki gjørdar kortini.

– Vit eru í løtuni í ferð vit at fáa fulla greiði á, hvørjar av teimum ætlaðu útbyggingunum í ár, ikki verða gjørdar kortini.

Hann sigur, at fyribils metingar siga, at tað eru íløgur fyri einar 40-50 milliónir, sum ætlanin var at gera í ár, men sum ikki verða gjørdar kortini.

– Tá ið vit hava fingið greiði á tí, fara vit eisini at kanna, hvørjar av íløgunum, sum ætlanin var at gera næsta ár, kunnu framskundast til í ár, so at tær kunnu verða gjørdar fyri avlopspeningin í ár ístaðin.

– Sostatt fara vit at kanna eftir um tað ikki ber til at býta um, og at flyta íløgur ímillum árini, so at vit fáa bygt skipið, uttan at broyta tann samlaða íløgukarmin og tað ivist eg onga løtu at vit fáa.

### Ein munandi vinningur

Karsten Hansen sigur, at hann kann gott vera samdur í, at nýggja suðuroyarskipið er ein serlig íløga.

– Sum sum støðan í samfelagnum er hesi árini, er tað júst ein stórur vinningur, at heili 50% av samlaða íløgukarminum fara til eitt endamál, sum ikki ávirkar búskapin, men verður brúktur til eitt skip, sum verður bygt uttanlands.

– Hevði støðan í samfelagnum verið tann, at tað var neyðugt at seta arbeiði ígongd, hevði støðan verið ein heilt onnur, sigur Karsten Hansen.

Tí er hann framvegis av teirri sannføring, at suðuroyarskipið skal fíggjast innan tann íløgukarm, sum er lagdur.

– Samanumtikið er hetta ein spurningur um at stýra samfelagnum, so at tað eisini verður livandi her um 5 ella 10 ár, sigur Karsten Hansen.

Og hann leggur afturat, at hjá honum er nýggja suðuroyarskipið ráðfest allar ovast tey næstu árini.

– Vit tosa um tunlar og hvørt av sínum. Men hetta er sjálvur »tunnilin« til Suðuroyar og tað er avgjørt neyðugt at tað verður gjørt fyri at fáa Suðuroynna krókta upp í restina av landinum, so at suðuroyingar kunnu liva á jøvnum føti við okkum onnur.



# Avgerðin er endalig

*Bygdaráðið í Mikladals kommunu hevur avgjørt, at skúli skal bara verða í Mikladali og ikki á Trøllanesi, og tann avgerðin er endalig*



**Bygdaráðið heldur tað verða óforsvarligt við tveimum skúlum í Mikladals kommunu, og avgerðin hjá teimum viðvíkjandi skúlanum á Trøllanesi er endalig**

SKÚLASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

Bygdaráðið í Mikladali hevur tikið sína avgerð um skúlan á Trøllanesi, og tann avgerðin verður ikki broytt.

– Vit hava nú í nógv ár satsað upp á skúlan í Mikladali, og vit halda, at tað er óforsvarligt nú at fara at gera skúlan á Trøllanesi í stand eisini, sigur Christian Andreasen, sum er ein av teimum trimum bygdaráðslimunum í Mikladals kommunu.

Hinir báðir limirnir í bygdaráðnum eru burturstaddir í løtuni.

– Skúlin í Mikladali er í góðum standi, og vit hava til dømis keypt teldur til skúlan. Hinvegin er skúlin á Trøllanesi ikki hildin sum skúli seinastu mongu árini, og vit halda ikki, at tað er ráðiligt fyri kommununa at fara at seta hann í stand nú, sigur hann.

### Kláraðu einki sjálvi

Nýggja bygdaráðið í Mikladali kolldømdi avgerðina hjá fráfarandi bygdaráð um at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur.

– Gamla bygdaráðið hevði málið um skúlan á Trøllanesi fyri í 1997, men tað varð tað felt, og einki varð gjørt við skúlan øll hesi árini. Á seinasta fundinum áðrenn tey løgdu frá sær, avreiddu tey hetta málið, sum tey ikki kundu semjast um, til nýggja bygdaráðið, sigur Christian Andreasen

– Fólk á Trøllanesi stillaðu ikki upp til kommunuvalið, og tey atkvøddu blankt á valinum. Tí hava tey sjálvi sett seg uttan fyri ávirkan og standa nú á síðulinjuni og krevja nakað, sum tey ikki sjálvi kláraðu at fáa í lag, sigur Christian Andreasen.

Trøllanesfólk hevdu meirilutan í gamla bygdaráðnum, meðan tað einans eru fólk úr Mikladali, sum nú eru í bygdaráðnum.

### Skeiv mannagongd

Christian Andreasen heldur, at skeiv mannagongd er brúkt í málinum um skúlan á Trøllanesi.

– Tá Torbjørn Jacobsen tók avgerðina um at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur, visti hann um støðuna hjá bygdaráðnum. Vit høvdu sagt honum frá okkara avgerð, og hann fekk eisini grundgevingarnar fyri avgerðini, sigur Christian Andreasen.

– Hóast tað tekur hann avgerðin um at lata skúlan uppaftur, og tað halda vit er púra burturvið, sigur hann.

Christian Andreasen staðfestir, at teirra avgerð er endalig, og at einki verður gjørt meira við málið.

Hvat so við børnunum, sum eru tikin úr skúlanum?

– Tað fáa vit sum bygdaráð einki gjørt við. Vit hava sent fráboðanina til myndugleikarnar, og teir mugu taka sær av tí, sigur hann.

– Skúlagongdin á Trøllanesi hevur riggað sera væl øll hesi árini, og tí er eingin orsøk at broyta hetta.

### Sama íløgu

Christian Andreasen heldur, at búskaparpolitikkurin í landinum forðar fyri, at skúlin á Trøllanesi skal gerast í stand og takast í nýtslu.

– Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum sigur, at tvær kommunur, sum eru grannar, skulu ikki gera somu íløgu, men heldur samstarva um tær. Í hesum førum er talan um at gera somu íløgu á tveimum støðum í somu lítlu kommunu, og tað kann ikki verða rætt, sigur bygdaráðslimurin í Mikladali.

– Vit halda, at hetta málið varð avgreitt fyri langari tíð síðani, og tað visti Mentamálastýrið av. Tí er tað løgið, at teir nú mæla til at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur, sigur Christian Andreasen.

## Keramikk- og málningar
## Rólant W. Dam

Donku syskini Anders og Lotte Glob fara komandi mánan, at hava eina keramikk- og málningaframsýning í norðurlandahúsinum.

Í meðan Anders Glob býr Danmørk, hevur Lotte Glob búðleikast í Skotlandi í mong ár.

Bæði eru tey sera náttúru áhugaði, og sæst aftur á verkum teirra.

Anders Glob hevur havt framsýningar í Danmørk síðan 1964, meðan Lotte Glob eisini verið uttanlanda við verkum síðnum, í ávíkavist USA, New Zealandi, Skotlandi og Írlandi.

Framsýningin byrjar í dag kl. 14.00 og er í húsinum til og við sunnudagin 23. september.

## Føroyskur Haakon Magnus giftist eisini

Tað er ikki bara í Noregi at Haakon Magnus giftist leygardagin. Seinastu tíðina hava vit sæð lýsing í bløðunum, at eitt brúdleyp verður í Leirvík leygardagin og her eitur brúdgómurin júst tað sama sum norsku krúnprinsurin. Hann er eisini eisini føddur sama dag sum norski krúnprinsurin og hann er ættaður úr Kollafirði.

**je**

## Lummabók til skótar
## Rólant W. Dam og Birita H. Christiansen

Aftur í ár gevur Føroya Skótaráð eina bók. Bókin »Skóti 2001/2002« er eitt sera hent amboð.

Í bókini er millum annað álminakkin, upplýsingar um fyrstuhjálp, ymiskir knútar, hvussu ein skal nýta kort og kumpass, skótasangir, morsi talvan og mangt, mangt annað.

»Skóti 2001/2002« er prentað í 2000 eintøkumlatin øllum skótum í Føroyum.

## Russiskur dansur
## Birita H. Christiansen

Í novembur 2000 gjørdi ungdómsblaðið Krydd hjá Dimmu av at gera eina stuttsøgukaping fyri ung undir 30 ár. Vinnarin av hesi kapping gjørdist »Russiskur dansur« eftir Marjun Kjælnes, og nú eitt lítið ár seinri eru 9 av teimum 38 innsendu stuttsøgunum savnaðar saman til eitt stuttsøgusavn.

Bóklingurin ið kallast »Russiskur dansur - eitt stuttsøgusavn« kostar 50 krónur og kemur í bókabúðirnar í dag.

